# Nú kemur eitt útspæl úr Føroyum um eitur í alilaksi

**Vinnuhúsið hevur heitt á føroyskar myndugleikar um at geva teimum, sum keypa føroyskan laks eina formliga fráboðan um eitur í alilaksi**

EITUR Í ALILAKSI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit mugu vóna, at hetta bara er eitt upplop. Men sjálvandi skulu vit taka hetta í álvara.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum heldur ikki, at føroyingar eiga at lata vísindaligu kanningina um eitur í alilaksi, fara afturvið borðinum.

Tí heldur hann, at tað hevði verið hóskandi um føroyskir myndugleikar góvu okkara keyparum eina formliga fráboðan um støðuna.

Og tað hevur Vinnuhúsið heitt á myndugleikarnar um at gera og í skrivandi løtu verður ein slík fráboðan orðað.

Hann vísir á, at myndugleikarnir í bæði Skotlandi og í Noregi hava givið keyparum sínum eina formliga fráboðan um eiturevni í alilaksi og tað hevur hann eisini heitt á føroyskar myndugleikar um at gera.

Eitt er, hvat vit í Føroyum vita um hesi viðurskifti, men eitt heilt annað er, hvat okkara keyparar vita og tí heldur hann, at tað hevði verið ein stórur fyrimunir, at keyparararnir fingu eina formliga fráboðan úr Føroyum.

Annars heldur hann, at vit eiga at fylgja neyvt við gongdini.

Hann sigur, at fyribils sær út til, at hetta hevur havt ávirkan í Suðurevropa, men at bretar ikki hava latið við seg koma.

Og í gjár segði Finn Rasmussen á Landshandlinum, sum útflytur nógvan laks, at eisini danir keyptu laks sum um at onki var hent.

## Ivast í endamálinum

Annars er Jan Mortensen ikki heilt tryggur við vísindaliga virðið í hesi kanningini.

Í fyrstu atløgu heldur hann, at tað er hugvekjandi, at úrslitið av kanningini kemur beint nú.

Hann sipar til, at í USA er tað fyri ein stóran part privata vinnan, sum fíggjar gransking.

– Eg sigi ikki at tað er nakar samanhangur, men vit eiga at leggja okkum í geyma, at úrslitið av hesi kanningini um eiturevni í alilaksi kemur samstundis sum tað kemur fram, at neytaøði hevur tikið seg upp í USA.

Og Jan Mortensen spyr um tað er heilt óhugsandi at ætlanin er at leiða tankarnar frá trupulleikanum við neytaøði, helst tá ið hugsað verður um, hvussu stór vinnan neytahald er í USA.

Hann vísir eisini á, at eisini amerikanarar sjálvir ivast í kanningini. Hann sigur, at í einum tíðarriti verður víst á, at granskarar hava aldrin ávarað ímóti at eta smør, hóast tað er meiri pcb í smøri sum í alilaksi.

Tað, sum normenn og skotar hava víst á í sínum formligu fráboðanum til keypararnar, er at fyrimunirnir við at eta laks eru nógv størri enn vandarnir.

Tað verður eisini víst á, at amerikansku granskararnir hava lagt sítt støði eftir teimum markvirðum, sum EPA (Enviromental Protection Agency) hevur ásett fyri stuttleikafiskarar, sum ofta fiska í illa dálkaðum vøtnum og sum ikki eru alment viðurkend í USA.

Sostatt hava teir ikki lagt støði eftir teimum amrkvirðum sum almenni myndugleikin í USA, FDA (Food and Drug Administration) hevur ásett.

Høvdu teir tað, hevði onki verið at skrivað um, tí nøgdin av eiturevnum í laksi eru langt undir teimum markvirðum, sum FDA ásetir.

Nøgdirnar eru eisini langt undir teimum markvirðum, sum ES ásetir.

## Onki nýtt

Annars sigur Jan Mortensen, at tað er onki nýtt, at dioxin og eiturevni eru í alilaksi, tí tað hava vit vita leingi.

Tað verður eisini regluliga kannað og hann hevur tað álit á føroyskum myndugleikum, at hevði nakað verið at funnist at, høvdu teir tala at.

Stjórin í Vinnuhúsinum leggur afturat, at í eini eftirmeting av amerikansku kanningini, hevur Charles R. Santerre, professari við lærda háskúlan í Purdue, staðfest, at etur tú eina máltíð av laksi um vikuna uppá eini 100 gramm í heili 70 ár, økir hetta um vandan fyri krabbmeini við bara 1 til 100.000.

Hansara niðurstøða er sostatt, at fyrimunirnir við at eta eina máltíð av aldum laksi eru størri enn møguligir vandar.

Hann vísir eisini á, at frá 1997 til 2001, fullu nøgdirnar av dioxin og pcb í matvørum sum heild umleið 50%.

– Teir, sum gera laksafóður, hava eisini lagt dent á at minka um nøgdirnar av hesum evnum í laksafóðrinum.

– Tí er vert at gera vart við at fiskurin sum er grundarlag undir kanningini í Science var tikin í 2002. Sostatt er talan um fisk, sum hevur verið fóðraður ímillum 1999 og 2002.

– Við dagsins fóðri vildu nøgdirnar av dioxin og PCB tí ivaleyst verið nakað minni, sigur Jan Mortensen.



*Vit skulu fylgja við gongdini heldur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum. Hann heldur, at tað er hugvekjandi at kanningin um eitur í laksi kemur beint aftaná, at trupulleikar við neytaøði hava tikið seg upp í USA*

# Suðuroyingar skulu sjálvir taka um endan og útvega skip



*– Skulu vit nevna eitt einstakt stig, sum kundi ment Suðuroynna, ivist eg ikki í, at tað, sum hevði gjørt størst mun, hevði verið at útvega eitt skip, sum siglur beinleiðis úr Suðuroynni niður ás marknaðin í Evropa, sigur Rógvi Reinert, stjóri á flakavirkinum í Hvalba*

**Ferðasambandið ímillum Suðuroy og meginlandið í Evropa, er ikki nóg gott. Verður tað ikki betri, eiga suðuroyingar sjálvir at taka um endan, sigur stjórin á flakavirkinum í Hvalba**

FERÐASAMBAND
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Suðuroyingar mugu sjálvir taka neyðug stig.

Tað heldur Rógvi Reinert, stjóri á flakavirkinum í Hvalba, sum Føroya Fiskavirking nú rekur.

Og tað, stjórin hugsar um, er at taka neyðug stig til at bøta um ferðasambandið ímillum Suðuroy og meginlandið í Evropa.

Hann heldur nevniliga, at hetta er ein avgjørd fortreyt fyri menning í Suðuroynni. Stjórin á Flakavirkinum í Hvalba heldur, at sambandið ímillum Suðuroynna og meginlandið í Evropa er nú so vánaligt, at tað er ein beinleiðis trupulleiki hjá vinnuni.

Men ístaðin fyri at leggja fiskivinnuna í Suðuroynni um, mælir hann suðuroyingum til at hugsa øðrvísi.

– Suðuroyingar eiga sjálvir at taka stig til at útvega skip, sum skal sigla beinleiðis ímillum Suðuroynna og meginlandið í Evropa, heldur Rógvi Reinert.

## Ferðasambandið bara versnar

Í seinastuni hava vinnulívsfólk meiri enn einaferð sagt, at skal tað bera til at arbeiða fisk í Suðuroynni og flyta feskar vørur av landinum, er tað ein avgjørd fortreyt, at beinleiðis samband aftur verður ímillum Suðuroynna og meginlandið í Evropa.

Men tíverri er veruleikin tann, at ferðasambandið ímillum Suðuroynna og meginlandið í Evropa, verður truplari og truplari. Fyri nøkrum árum síðani var beinleiðis samband av Tvøroyri til Skotlands hvørt fríggjakvøld.

Tá bar til hjá fiskavirkjum í Suðuroy at arbeiða líka til seint fríggjadag.

Men í 1996 varð Teistin seldur og tá helt beinleiðis sambandið eisini uppat.

Og vinnulívsfólk eru av teirri sannføring, at hetta er størsta einstaka bakkast, sum fiskivinnan í Suðuroy hevur verið fyri í nýggjari tíð.

Eftir tað fór Norrøna at sigla, men hon sigldi hóskvøld. Ì hesum sambandi sigldi Smyril av Drelnesi klokkan 19 hóskvøld og tí máttu fiskavirkini gevast seinnapartin hósdag fyri at fáa fiskin til Havnar, so at hann kundi koma við Norrønu.

Men síðani hevur Norrøna framskundað fráferðina hósdag tvær ferðir. Fyrst varð hon framskundað, so at Smyril mátti sigla av Drelnesi klokkan 17.30 og nú er hon aftur broytt, so at Smyril noyðist at sigla klokkan 15.30.

Tískil noyðast fiskavirkini at gevast at arbeiða á miðdegi hósdag og sostatt hava teir mist hálvan annan dag í framleiðsluni.

## Sakina í egnar hendur

Rógvi Reinert sigur, at fyri ikki so nógvum árum síðani vóru suðuroyingar á odda, tá ið tað tað ráddi um at virka og útflyta feskar fiskavørur.

Og tá lá ferðasambandið út í heim í eini natúrligari legu við tað, at báturin byrjaði norðast og legði at í Suðuroy sum síðstu havn á veg niður til Skotlands.

– Og hóast vit ikki treytaleyst skulu fylgja gamlari siðvenju, er tað onki løgið í, at fiskivinnan í Suðuroynni framvegis roynir at byggja á tað, sum suðuroyingar kenna til og har teir eru sterkir. Sjálvsagt er tað ein tí tað vildi verið ein natúrligur fyrimunur at bygt á tær royndir, suðuroyingar hava, leggur hann afturat.

Men hóast ferðasambandið er vánaligt, heldur hann ikki, at suðuroyingar eiga at stremba eftir at leggja framleiðsluna um, so at hon hóskar betri til teir flutningsmøguleikar, sum eru.

– Eg haldi, at suðuroyingar eiga at huga øðrvísi. Eg haldi, at øll fiskivinnuáhugamál í Suðuroynni, bæði feskfiskavirkini alingin og onnur, sum hava brúk fyri flutningi, skuldu tikið seg saman og útvegað eitt skip at siglt beinleiðis í millum Suðuroynna og meginlandið í Evropa

Í løtuni eru tað áhugamál í miðstaðarøkinum, sum leggja farmaflutningin ímillum Føroyar og meginlandið í Evropa til rættis og tað er natúrligt, at tey hugsa fyrst og fremst um, at flutningsmøguleikarnar úr miðstaðarøkinum skulu vera so góðir sum gjørligt.

Rógvi Reinert heldur tí, at tað er heilt natúrligt, at suðuroyingar sjálvir taka stig til eitt ferðasamband, sum hevði útgangsstøði í Suðuroynni.

Hetta kundi kanska verið gjørt í samtarvi við okkurt av teimum flutningsfeløgum, sum eru, ella við okkurt nýtt felag, sum kann hugsast at koma hendavegin.

– Men eru feløgini ikki sinnað til tað, eiga suðuroyingar sjálvir at taka seg saman at útvega eitt skip.

Hann leggur tó afturat, at hetta er eitt stórt tiltak og so vítt hann veit, hevur ongin rokna út, hvat eitt slíkt tiltak hevði kostað.

– Hetta er sjálvsagt eitt stórt tiltak. Men skulu vit nevna eitt einstakt tiltak, sum skuldi til fyri at ment Suðuroynna, ivist eg ikki í, at hetta hevði verið tað, sum hevði størst størstan munin. Og eg haldi avgjørt, at hetta er vert at arbeiða við í álvara, sigur stjórin á flakavirkinum í Hvalba.

Hann nevnir at enda, at tað er ongin sum sigur, at skipið skal sigla tómt aftur til Føroya, tí einsvæl og tað ber til at flyta fisk úr Føroyum við skipinum, ber tað væl til at flyta vørur út útlondum til Føroya tá ið skipið siglur heimaftur.



# Afturum skattaloynidómin

**Skattalættin hjá Sambandsflokkinum er at prísregulerað verandi skattastiga, sigur Magni Laksáfoss, valevni fyri Sambandsflokkin. Vit hyggja nærri at størsta loynidóminum í valstríðnum**

LOYNIDÓMUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Eitt tað mest umtalaða evnið í valstríðnum er skattalættin ella skattareformurin hjá Sambandsflokkinum.

Hesin góði skattalætti kann óivað kallast fyri størsti loynidómurin í Føroyum í løtuni, sum fólk kring alt landið práta um.

Men hvat inniber so hesin skattalættin?

## 60 milliónir

Skattalættin merkir fyrst og fremst, at fólk skulu gjalda minni í landsskatti. Og hesin skattalættin umfatar øll. Núverandi skattaskipan er skipað eftir einum sokallaðum progressivum stiga. Hetta merkir, tess meira tú vinnur av peningi tess harðari verður tann síðsta vunna inntøkukrónan skatta. Ein botnfrádráttur er, og síðani gjalda fólk skatt í ymsum stiga, alt eftir inntøku. Skattistigin í 2004 gevur fólkið ein botnfrádrátt áljóðandi 22.000 kr. Hvør inntøku króna yvir 170.000 kr. árliga verður skattað við 36% landsskatti. Afturat hesum kemur kommunuskatturin. Hesi skattaprosent eru sera ymisk - frá 13% til 22,5%. Taka vit eitt miðaltal áljóðandi 20%, so merkir tað, at fólk rinda 56% í inntøkuskatti fyri hvørja inntøkukrónu yvir 170.000 kr. Hetta eru inntøkur yvir einar 14.000 kr um mánaðin.

Eitt loft er eisini ásett, soleiðis at eingin samlað rindar meira enn helmingin av inntøkuni í skatti. Tað eru kortini ógvuliga fá, sum røkka hesum lofti.

Ætlanin hjá Sambandsflokkinum er at broyta stigan á skattastigan á fylgjandi hættir: Botnfrádrátturin skal fara úr 22.000 krónum til 30.000 krónur eftir fýra árum, og tað sokallaða toppskattamarkið skal flytast úr 170.000 til 300.000 eftir fýra árum. Altso ein skattalætti, sum ávirkar allar inntøkur. Hetta merkir eisini, at eingin inntøka undir 300.000 árliga rindar meira enn 40% í marginalskatti.

Hendan broytingin er samstundis eitt stig frá einum progressivum skattastiga til enn meira proportionalan skattastiga, har tað er ein botnfrádráttur og síðani eitt ella heilt fáa skattastig. Men skattastigin er framvegis progressivur.

Sambandsflokkurin sigur, at hesin skattalættin fer at kosta seksti milliónir um árið. Hesi tøl koma frá Sambandsflokkinum og byggja á útrokningar við skattaintøkunum í 2002 sum grundarlag.




*Hesin grafurin vísir ætlaða skattalættan hjá Sambandsflokkinum. Markið fyri nær inntøkan verður toppskattað verður minkað yvir fýra ár. Grái parturin er ætlaða broytingin, sum merkir minni skatt til øll - og minni inntøkur til landskassan.*

## Einki hokus pokus

Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og valevni hjá Sambandsflokkinum, hevur ein av teimum, sum hevur staðið fyri at evna uppskotið til.

Hann heldur, at uppskotið er púra greitt.

-Tað, vit gera, er at prísregulerað verandi skattaskipan. Neyðugt er at regulera skattaskipanina hvørt ár. Síðani 1998 er miðalskattaprosentið hjá fólkið hækkað við trimum prosentum, tí lønin er hækkað, men skattastigin ikki er reguleraður tilsvarandi, sigur Magni Laksáfoss.

Búskaparfrøðingurin hjá Sambandsflokkinum leggur eina við, at hetta er ein skattalætti ætlaðar til arbeiðarafjøldina.

-Øll fáa ein skattalætta við hesum. Men tað eru tær lægstu inntøkurnar, sum fáa mest burturúr, sigur Magni Laksáfoss.

Hvussu skal hesin skattalættin so fíggjast?

-Skattalættin kostar 60 mió. krónur árliga í fýra ár. Vit meta, at 20% av honum koma innaftur gjøgnum skatt og avgjøld orsakað av økta virkseminum, sum skattalættin gevur. Fyrst fremst er ætlanin at skapa búskaparvøkstur. Umleið tíggju milliónir skulu fíggjast við sparingum. Við verandi búskapargongd við einum lítlum lønar- og prísvøkstri koma hinir 38 milliónirnar inn av sær sjálvum, sigur Magni Laksáfoss.

## Óneyðugur loynidómur

Sjálvur er Magni Laksáfoss sannførdur um, at tað als ikki var neyðugt at halda hendan góða skattalætta loyniligan.

- Hetta er sera einfalt, og vit áttu at havt almannakunngjørt hetta beinanvegin fyri at sleppa undan øllum hesum gitingunum. Men hetta er hóast alt ein partur av einari størri og umfatandi ætlan, sum kallast fyri Virkisætlanin. Tað eru so onnur, sum hava sett fokus á skattalættin, tí hevur tað verið neyðugt hjá okkum at útgreina hann nærri.




